# Gud, Tú ert Gud mín

Orð: Hans Andreas Jacobsen

Lag: Øssur Berghamar




2. Tí at Tín náði er betri enn lívið,
við mínum varrum eg beri mín song.
Eg skal Tær lova, so leingi eg livi,
geva Tær æru sum Harra og Kong.

3. Tá eg so minnist Teg á míni legu,
á náttarstund, tá eg hugsi um Teg,
at Tú vart hjálp mín í trongastu døgum,
tá má eg hátt rópa: Sál mín, teg gleð!

4. Trygt Tú meg leiðir við høgru hond Tíni,
uppi mær heldur hvønn dag, hvørja stund.
Einki kann saka meg, trygt fram eg gangi,
inntil eg komi til Himmalsins fund.